# Ónøgd við skúlabuss og ætlanir um útibarnagarð

*Á Hvítanesi eru tey ikki glað fyri ætlanirnar um ein útibarnagarð í skúlanum, tí ferðsluviðurskiftini eru út av lagi og børn eru yvirkoyrd. Eisini er trupult hjá skúlabørnum á Hvítanesi at sleppa heim úr skúlanum í Hoyvík, tí bussfarleiðin er sera ólagalig*

Dagfinn Olsen

Á Hvítanesi hava tey seinastu 30 árini havt trupulleikar av, at sera trupult hevur verið hjá børnum at sleppa heim, eftir loknan skúladag í skúlanum í Hoyvík.

Soleiðis er støðan enn. Vanligt er aðrastaðni í býnum, at skúlabørn hava bussfarleið heim. T.d. á Norðastahorni og í Svanga, men hetta hevur at gera við ávísa frástøðu, ið tey búgva frá skúlanum.

Á Hvítanesi mugu børnini heim við býbussi. Hesin koyrdi áður framvið skúlanum við Vegin Langa og sneiddi oman á Hvítanes. Tað ger hann ikki longur og børnini mugu oman eftir Mannbrekku og yvir um vegin, ið er ein av ferðslutyngstu vegum í landinum.

Annar trupulleiki er, at við skýlið uppi á Hvítanesi er loyvi at koyra 80 km/t framvið og tað er komið fyri meira enn einaferð, at børn eru yvirkoyrd .

Ein mamma á Hvítanesi, sum vit hava prátað við sigur, at ætlanir og lyfti hava verið um eina sonevnda viadukt, ella tunnil undir vegin, men enn er einki hent og hetta er landsmál.

### Útibarnagarð

Mikukvøldið var fundur á Hvítanesi, har borgarar og umboð úr Tórshavnar Býráð vóru til staðar.

Býráðið í Havn hevur nevniliga ætlanir um ein útbarnagarð í skúlanum á Hvítanesi.

Men eftir tí, ið frættist av Hvítanesi, so eru tey ikki trygg við hesar ætlanir, so longi sum ferðsluviðurskiftini eru, sum tey eru í dag.

Hóast tey á Hvítanesi kundu ynskt sær útibarnagarð, so eru tey ikki trygg við støðuna, sum nú er.

### Landsmál

Leivur Hansen, býráðsformaður í Havn sigur, at tað kom fram á fundinum, at tey eru ikki trygg við ferðsluviðurskiftini á Hvítanesi. Men hann váttar samstundis, at hesin trupulleikin er ikki nýggjur.

Hann sigur, at Býráðið hevur tingast við Landsverkfrøðingin um eina viadukt. Trupulleikin er, at har hava tey eina ov lítla játtan til trygdarábøtur og mugu raðfesta. Og ein viadukt er ikki fammaliga, eftir tí, sum býráðsfomaðurin hevur fingið at vita.

Talan er sostatt um landsveg og landsmál. Tí hevur býráðið heitt á borgarar á Hvítanesi, um at venda sær til politikarar í Suðurstreymi, fyri at fáa teir at gera sína ávirkan galdandi.

Býráðið sjálvt skrivar eisini bræv, sum skal sendast til politikarar í Suðurstreymi, og har Býráðið heitir á teir um at gera sína ávirkan galdandi. (Sí aðrastaðni í blaðnum).

– Ímeðan kanna vit, um busskoyringin kann umleggjast, so viðurskiftini verða trygg hjá skúlabørnunum komandi skúlaár, sigur Leivur Hansen.

Hann sigur eisini, at ætlanirnar um útibarnagarð eru so háttaðar, at talan skal fyrst vera um eitt royndarár. Hann er vísur í, at borgarar á Hvítanesi, Landsverkfrøðingurin og Býráðið finna eina loysn á trupulleikunum, so øll verða nøgd.

– Talan er um rímulig ynski frá borgarunum á Hvítanesi, sum vit fara at lurta eftir, sigur býráðsformaðurin í Havn, Leivur Hansen.



*Á Hvítanesi eru tey ótrygg við ferðsluviðurskiftini hjá skúlabørnum og ikki trygg við ætlanirnar um at leggja ein útibarnagarð á staðnum undir núverandi ferðsluviðurskiftum* **(Savnsmynd)**



# Opið hús í Havn

*Í veruleikanum er talan um fleiri opin hús. Og ein kann bert skriva sær aftanfyri oyrað, at tíðirnar broytast og tað gera gamlar havnarmyndir eisini*



Dagfinn Olsen
Myndir: D.Olsen

Fremmandir gestir í gøtunum í Havn halda óivað, at her búgva blíð fólk. Og óivað er tað eisini rætt.

Men í øllum førum skal ein ikki ganga langt í Havn í hesum døgum, áðrenn ein gongur seg fram á okkurt opið hús.

Tey eru fleiri. Men hvørt hetta er talan og fráboðan um gestablídni, sigur søgan einki um.

Hinvegin, so kann staðfestast, at tíðirnar broytast og tað gera gamlar havnarmyndir eisini. Fyri 10 árum varð Lotið in-staðið, tá um dans ráddi. Áðrenn tað var tað smiðja. Í dag er har eitt gapandi hol, ið tosað verður aftur og fram um.

Á Áarvegnum fara broytingar fram og eisini har gapar í hesum døgum. Talan er eisini um at gera annað hol, nevniliga í vegin, so Havnará kemur til sín rætt aftur.

Og húsini hjá Gulu Skótunum uppi við viðarlundina eru lyft upp, so har gapar í løtuni eisini undir teimum.

Hol. Í Føroyum eru vit framvegis í fer við enn fleri berghol. Onkur segði, at eitt hol er einki. So kunnu vit, keglast, hvørt tað er rætt, ella ikki.



*Tíðirnar broytast og tað gera gamlar havnarmyndir eisini*

## Mega

Í greinini um skeiðsmiðdeplin í Miðbýnum í Havn, sum menninir aftanfyri handlin Mega eiga, kom onkur villa í. Heldur ikki var myndin við í greinini. Tað bøta vit um her.

M.a. varð nevnt í greinini um ymiska tøkni, sum KT- Centrum hevur til taks. Har skal sjálvsagt standa viðvíkjandi ljóðinum, at talan er um surround sound.

Og so er tað sjálvandi í matsteðginum, at skeiðluttakarar kunnu spáka oman í Rio Bravo, sum KT-Centrum hevur avtalu við.

Hósat talan ikki er um nakra mega stórar villur, so eru tær nú rættaðar.

*-blðm -*



*Mark Joensen í nýggju og hugnaligu hølunum hjá KT-Centrum í Miðbýnum í Havn*



# Streymslit kosta Havsbrún milliónir

*Lágur spenningur. Yvirspenningur. Streymslit. Hetta er regluligur kostur hjá Havsbrún í Fuglafirði. Stjórin Bergur Poulsen, sigur at vánaliga streymveitingin elvir til ótolandi arbeiðskor. Eisini Bakkafrost á Glyvrum er rakt.*

Niclas Johannesen

Tjúgutals ferðir svíkti streymurin Havsbrún tíðarskeiðið 14. februar til 8. mars í ár.

Onkuntíð upp til tíggju ferðir ein dag. Og hvørja ferð steðgaði øll framleiðlsa á Havsbrún upp.

Sambært stjóran á Havsbrún Bergur Poulsen, so hevur útsaliga streymveitingin í longri tíð - áravís - hingið sum ein marra yvir Fuglafjørð. Fyri stóru ídnaðarfyritøkuna merkir skinklandi streymveitingin milliónir í meirútreidslum. Árliga.

Vit hava verið noydd at biða skip fara avstað aftur, tí vit ikki hava kunnað tikið ímóti. Hvørja ferð streymurin fer av lagi - tá spenningurin broytist - so nervar hetta okkara tól í so stóran mun, at allar maskinur mugu tømast fyri materiali.

- Hátøkniligu tólini gerast í ørviti, og tey, sum vara av tekniska partinum pøsa seg upp við at stilla tólini av nýggjum. Bert fyri at ásanna, alt alt kanska er farið av lagi løtu seinni, sigur Bergur Poulsen.

Hann leggur aftrat, at tað ferð eftir ferð vísir seg, at nakrar av teimum túsundtals el-eindunum fáa slíkan hvøkk, at tær er brenna saman og mugu skiftast út.

### Niðurslítandi

- Tað sigur seg sjálvt, at slík arbeiðsviðurskifti er sálarliga niðurslítandi fyri okkara starvsfólk. Skipini liggja við bryggjuna og bíða eftir at verða landaði. Tey hava ikki stundir at bíða.

- Livitíðin hjá fleiri av okkara maskinum rýkur eisini í botn. Rætt og slætt tí, útgerðin er ikki bygd til so primitiv viðurskifti, sigur Bergur Poulsen.

Bergur Poulsen vísir á, at bert eitt lítið blink í streymveitingini ger, at øll framleiðsla steðgar upp.

- Kappingarneytar okkara tosa slettis ikki um streymslit. Men hjá okkum er hetta dagligur kostur. Hetta skaðar okkara kappingarføri almikið.

### Vandi

Bergur Poulsen vísir eisini á, at tað heldur ikki er uttan vanda, tá eitt stórt virki sum Havsbrún brádliga steðgar upp.

- Flutningurin av dampi frá teimum stóru fiskamjølsturkunum til inndamparan steðgar jú eisini upp, og tað førir við sær, at heiti dampurin goysir út í framleiðsluhøllini, har talvur, motorar og onnur elektrisk útgerð stendur. Slíkt er eisini við til at stytta munandi um livitíðina hjá hesum tólunum, leggur Bergur Poulsen aftrat.

Stjórin á Havsbrún sigur seg óteljandi ferðir hava sett seg í samband við SEV.
Teir eru fullgreiðir yvir okkara støðu. Men enn er onki munagott hent, sigur Bergur Poulsen.

Tað er kortini ikki bara í Fuglafirði, at streymurin svíkir. Eisini á Bakkafrost á Glyvrum nervar svikaligi streymurin framleiðsluna. Regin Jacobsen, stjóri, sigur at tað hendir alt ov ofta at streymurin fer.

- Fyri hvørt streymslit missa vit tíggjutúsundtals krónur, sigur Regin Jacobsen.

Hann leggur aftrat, at í samrøðu við leiðsluna á SEV hevur Bakkafrost fingið tilsøgn um, at teir nú av álvara eru byrjaðir at arbeiða við at tryggja økið betur.

- Eystara síða á Skálafjørðinum hevur verið eitt tað ringasta til streymslit í Føroyum, men SEV sigur seg nú hava sett fleiri arbeiði í verk fyri at betra hetta, leggur Regin Jacobsen aftrat.

### Kanna nýggja útgerð

Klæmint Weihi, stjóri á SEV sigur, at hann ynskir ikki at fara út í blað kjak við teirra størstu kundar.

- Eg kann bert siga, at streymveitinin av Fuglafjørði er bøtt heilt munandi seinnu árini. Íløgur eru gjørdar í nýggjar háspenningskaðalar úr Kambsdali til Fuglafjørð, soleiðis at bygdin í dag hevur tríggjar streymveitingarmøguleikar, háspenningsringsamband er gjørt í sjálvari bygdini og transformarakapaciteturin er øktur munandi.

- Klæmint Weihe leggur aftrat, at sama er galdandi fyri onnur økir í landinum, har nógv íðnaðarvirki eru. Hann vísir á, at tíðir broytast og nógv nýggj tøkni verður nýtt, bæði í húsarhaldinum ikki minst á virkjunum. Hetta merkir at krøvini til spenningskvalitetin er nógva ferðir størri enn áður.

- Hetta eru trupulleikar, sum elveitarar um allan heim kenna til. Tað verður gjørt eitt miðvíst arbeiðið at finna loysnir á hesum trupulleika. Framleiðarar av eltekniskari útgerð hava ídag loysnir sum kunnu nýtast, men sum enn eru sera dýrar, sigur Klæmint Weihe.
SEV stjórin leggur í hesum sambandi aftrat, at kannað verður um hetta kann nýtast í sambandi við trupulleikarnar á Havsbrún.



*Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún, sigur, at mongu streymslitini ikki bara kosta milliónir. Tey elva eisini til ørkymlan millum arbeiðsfólk*



*Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, sigur at eystari armur á Skálafjørðinum hevur verið ein tann ringasti til streymslit. Bakkafrost missir eisini tíggjutúsundtals krónur fyri hvørt streymslit*





*Klæmint Weihe sigur, at spenningsgóðskan er nógvar ferðir størri enn áður, soleiðis at bygdin í dag hevur tríggjar streymveitingarmøguleikar, háspenningsringsamband er gjørt í sjálvari bygdini og transformarakapaciteturin er øktur munandi*

3arin
ELECTRONIC
bjóðar bestu dygd innan teldur og telduútgerð.

Vit umboða m.a. Fujitsu og Siemens og hava eitt gott úrval av:

- TELDUM
- FARTELDUM
- KT-KALENDARUM
- FARTELEFONUM
- PC-SPØLUM
- PLAYSTATION
- PRINTARUM
- YM. TILHOYRI

Hoyr meira um okkara kvøld-service

Góður í ráðum - við munadyggari service frá formula.fo

3arin ELECTRONIC OG formula.fo
SMS · Tel 353537 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo